# Umfatandi paragraff 13 kanningar

PARAGRAFF 13
*Ingrid Bjarnastein*

Løgreglan er farin at gera umfatandi paragraff kanningar, og verður hetta gjørt í samráð við Ráðið fyri Ferðslutrygd.

Nú er løgreglan farin undir at gera umfatandi paragraff 13 kanningar. Fólk er serliga sett av til hetta arbeiðið, sum verður gjørt saman við Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Um vikuskiftið eru nógv fólk tikin. Flestu lógarbrotini eru, at fólk koyra uttan at hava koyrikortið við sær og lyktafeilir. Annars verða fólk tikin fyri at sita uttan trygdarsela, píkar, at tosa í fartelefon og annað.

Eisini í Eysturoynni hava verið paragraff 13 kanningar verið gjørdar. Fríggjadagin vórðu 37 bilar steðgaðir, harav 8 frágreiðingar eru skrivaðar, harav eru tríggir tiknir fyri ferð. Leygardagin vórðu kanningar gjørdar í Gøtu, Leirvík og Fuglafirði. Har vóru 25 bilar steðgaðir, og ein frágreiðing skrivað. Har hevði førarin onki koyrikort – altso ongantíð tikið koyrikortið.

DIABETES
EVNISDAGUR Á TJALDURS APOTEK

Hósdagin 16. mai 2002 frá kl. 10 - 17

Serfrøðingur frá fyritøkuni HERMETICO vísir tað nýggjasta innan:

- Tól til blóðsukurmátingar og teststrimlar
- Prik-pennar og lansettir
- Insulinpennar og pennanálir
- Tól til blóðtrýstmátingar og tól til fitismátingar ( kropsfiti)

Møguleiki er at máta blóðsukur, blóðtrýst og kropsfiti á staðnum.

Diabetikarar og fólk við áhuga fyri diabetesviðgerð eru vælkomin.

Tjaldurs Apotek

www.apotek.fo







# Trý innbrot í Havnini

**Fríggjamorgunin fekk politistøðin í Havn fráboðan um trý innbrot**

INNBROT
*Ingrid Bjarnastein*

Miðbýurin í Havn var offur fyri nøkur innbrot hósnáttin. Í barnahandlinum Bamsuni hevði onkur brotið inn, men har var onki tikið. Hinumegin vegin, í Vilma, hevði eisini verið innbrot, har gerningsmenninir hava stolið nøkur kot. Longri niðri í býnum, í H.N Jacobsens bókhandli, hevði onkur ókunnuggestur eisini leitað sær veg inn. Har var vekslipeningur stolin.

†

**Hans Samsonsen**
Tvøroyri

andaðist leygardagin 11. mai, 43 ára gamal.

## Tøkk

Eg takki hjartaliga øllum, sum á ymsan hátt heiðraðu meg á 80-ára føðingardegi mínum.

Bestu heilsur
**Leivur Mikkelsen, Klaksvík**



